LM-011/2025

LØGTINGIÐ

Rættarnevndin

27. oktober 2025
lm. nr. 11/2025
(at tilskila í svari)

Løgtingsforkvinnan

Leingjan av freist til framløgu av áliti í løgtingsmáli 11/2025: Uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógin)

Uppskotið varð lagt fram 23. september 2025, og eftir 1. viðgerð tann 30. september 2025 varð málið beint Rættarnevndini.

Rættarnevndin umrøddi málið á fundi 7. oktober 2025 og gjørdi tá av at kalla feløg og myndugleikar á fund við nevndina at viðgera málið. Av ymsum orsøkum hevur ikki borið til at hava hesar fundir.

Málið er á skrá til fundirnar í Rættarnevndini 28. oktober og 3. november, og eftir hesar verður farið undir at skriva álit.

Rættarnevndin fer tíðkil at heita á løgtingsforkvinnuna um at leingja freistina at leggja fram álit sbrt. § 32, stk. 2 í Tingskipanini til 7. november 2025.

Vegna nevndarforkvinnuna

Jóhanna Arge
nevndarskrivari

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO